Dagf. 21. januar 2025
HMR j. nr. 25/00669-7

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-069/2024 eftir § 52 a í tingskipanini effektiva nýtslu av MR-skannarum, frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni

Spurningar:

1. Hvørjar eru royndirnar hjá sjúkrahúsverkinum at skipa og nýta MR-skannararnar, nú verkið hevur ræði á tveimum slíkum skannarum, herundir eisini við atliti til at gera skanningar í Føroyum, sum ikki hava verið gjørdar her áður?
2. Hvussu er ætlaða býtið millum nýtslu av teimum báðum MR-skannarunum hjá sjúkrahúsverkinum?
3. Eru nøkur sløg av skanningum, sum betur kunnu gerast í eldra MR-skannaranum hjá sjúkrahúsverkinum enn í nýggjara skannaranum?
4. Er tað fíggjarliga og heilsuliga skynsamt, um mann framhaldandi brúkar eldra skannaran út á kvøldarnar, tá samlaði skannimøguleikin í øllum førum er tvífaldaður?

Svar:

Til spurning 1

Starvsfólk á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum eru í MR-toyminum, sum stendur fyri at gera allar MR-skanningar í Sjúkrahúsverkinum. Áðrenn 3T MR-skannarin varð tikin í nýtslu á Klaksvíkar sjúkrahúsi í mai 2024, varð farið undir eina tilgongd at førleikamenna starvsfólkini í MR-toyminum til at brúka nýggja skannaran. Arbeiðið at skipa og íverkseta MR skannararnar í Sjúkrahúsverkinum hevur gingið eftir ætlan, bæði viðvíkjandi upplæring av starvsfólkum og verkseting av kanningum.

Í desember í fjør varð farið undir at skanna fyri prostata á Klaksvíkar sjúkrahúsi. MR skanningar av prostata hava ikki verið gjørdar í Føroyum áður. Arbeiðið við at íverkseta MR skanningar av prostata, hevur millum annað fevnt um broyting av avtalum millum Sjúkrahúsverkið og Aalborg Universitetshospital; umfatandi samskipanararbeiði hjá teimum, ið varða av urologiini í Sjúkrahúsverkinum; uppvenjing uttanlands av røntgenlæknum og radiografum; umframt at tillaga arbeiðsuppgávur hjá øðrum eindum í Sjúkrahúsverkinum.

Til spurning 2

Tað er ikki lagt nakað fast ítøkiligt býti millum MR-skannararnar á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Ávísingar verða visiteraðar av røntgenlækna. Í fyrstu syftu verður hetta gjørt eftir eini kliniskari læknafakligari avgerð, og síðan eftir, hvar sjúklingurin hevur bústað, so hann so vítt møguligt fær stytsta veg til MR-skanningina.

Til spurning 3

Flestu skanningar kunnu gerast í báðum skannarunum, meðan onkrir sjúklingar bert kunnu skannast í øðrum MR-skannaranum, og aðrir bert í hinum MR-skannaranum. Hetta er bæði tengt at kanningarslagnum og at MR-trygd, og í hvørjum einstøkum føri er tað ein læknafaklig meting hjá røntgenlæknanum. Sum dømi kann nevnast, at skanning av prostata við kontrast bert verður framd í MR-skannaranum í Klaksvík, meðan sjúklingar, sum hava metal í kroppinum (t.d. stentar og protesur) verða skannaðir í MR-skannaranum á Landssjúkrahúsinum.

Til spurning 4

Víkjandi skanning um kvøldarnar hevur tað verið ein politisk raðfesting, at Røntgendeildin á Landssjúkrahúsinum ger MR-skanningar eftir vanliga arbeiðstíð, fyri at stytta um bíðitíðina til MR-skanningar.

Tá ið virksemið við tveimum MR-skannarum í Sjúkrahúsverkinum er komið í fasta legu er kapasiteturin so mikið stórur, at tað frameftir verður so at siga ongin bíðitíð at sleppa framat. Tá verður heldur ikki neyðugt og skynsamt at gera MR-skanningar eftir vanliga arbeiðstíð, og tí kemur tað ikki at halda áfram.

Heilsumálaráðið, 21. januar 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna